# 3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

DAGFINN OLSEN

## A1




### Here we come

Ben, Christian, Mark og Paul. Solei›is eita dreymabeiggjarnir, i› manna bólkin A1.

Jú, enn ein bólkur vi› vøkrum og vælkløddum sangarum hevur sæ› dagsins ljós. Bert enn ein í rø›ini? Vit hava jú longu sæ› Backsteet Boys, Boyzone, Take That og Westlife. Og á dámusi›uni SpiceGirls og a›rar.

Men fløgan vi› A1 kann gera lurtaran bilsnan. Sjálvsagt alt eftir, hvat ein hev›i vænta›.

Jú, talan er um silkimjúkar drongjarøddir, i› hóska til mjúku hú›ina og óiva› líka mjúku klæ›ini. Ein bólkur, i› helst hevur ungu genturnar sum málbólk.

Men takast kann ikki frá A1, at ta› er gott og vakurt og væl pussa›, ta› sum kemur úr hátalaranum.

Og so er ta› jú sera positivt og ø›rvísi, at drongirnir í A1 veruliga sjálvir hava skriva› or› og løg á hesi vælljómandi fløgu.

Here we come, siga teir. Jú, her eru teir og ta› ljó›ar væl. Stuttligt, at ta› eru teir sjálvir, i› hava naka› at leggja fram og at teir sjálvir framlei›a tilfari›.

## Roy Orbison




### The very best of Roy

Ein av teim stóru í fimti- og sekstiárunum, sum tó ongantí› fána›i heilt burtur.

Í 1988 doy›i Roy Orbison knappliga av hjartatilbur›i. Ein sera avhildin ma›ur millum onnur listafólk og fólk innan tónleikin.

Ta› var Johnny Cash, sum í fimtiárunum fekk tann unga Roy at senda eina upptøku til Sam Philips. Solei›is kom gongd á.

Vit kenna øll løg sum You got it, Pretty Woman, Only the lonly og California Blue. Sannir klassikarar.

Á hesu fløgu eru savna›ir 22 av teim bestu hjá Orbison. Fløgan er fyri at hei›ra Orbison, nú fari› er í n‡tt ártúsund, skrivar einkjan eftir Roy, Barbara Orbison.

Áhugavert er eisini at lesa danska tekstin í fløguhúsanum, har søgan um Orbison er søgd í stuttum.

Ein gó› og áhugaverd fløga. Løgini kenna vit, so ein veit hvat ein fær, um ein ognar sær hesa fløguna - Gó›ir, gamlir Orbison klassikarar.

## Sanne Salomonsen




### De bedste af de bedste

Sanne Salomonsen. Danska rockmamman ella rockdrotningin.

Hon er komin langt, sí›ani ungu árini vi› Anne Linnet og Lis Sørensen og sí›ani árini í einum av fremstu donsku bólkunum fyrst í áttatiárunum, Sneakers.

Rockdrotiningin hevur í samstarvinum vi› heimskenda danan Chris Minh Doky prógva›, at hon eisini megnar jazz. N‡liga var hon í Føroyum og føroyingar fingu sjón fyri søgn.

Nú er komin fløga vi› savni av teim gó›u løgunum hjá Sanne. Og tey eru ikki so fá.

Tá fløgan so enntá eitur "tey bestu av teim bestu", so er sjálvsagt talan um eitt tyssi av blómum, i› ikki følna.



## Søkt verður eftir handilsfólki

Vit sóknast eftir einum handilsfólki til búnýtisdeildina á Hjalla. Viðkomandi skal hava áhuga í handilslívinum og vera dugnalig/ur og ágrýtin.

Arbeiðið umfatar avgreiðslu av viðskiftafólki og viðlíkahald av handlinum.

Umsøkjarin skal vera fyrikomandi, hava nakað av royndum við telduarbeiði og vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur hóskandi útbúgving og royndir í handilsvinnuni.

Umsókn við evt. prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi áðrenn fríggjadagin 25.2.2000.

LITAVAL P/F

Box 1019 • 110 Tórshavn
Tlf. 342500 • Fax 313847
E-post:bav@litaval.fo

## Sandoyingar, hyggið her!
## AKUPUNKTUR!

Um undirtøka verður fyri tí, verið eg at hitta á Sandi frá ***21. til 25. februar***.
Viðtalutíð fæst við at ringja á telefon **37 28 88** ella **21 28 88**.

AKUPUNKTIÐ
v/ Marjun Olsen
Tvøroyri

## 32 tons útróðrarbátur

sum hevur snelluloyvið í Íslandi og fiskidagar í bólki 4a, til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 214949 ella 288473**

## Eyka landsfundur

verður í Læraraskúlahøllini leygarmorgunin 19. feb. kl. 10.00.

**Javnaðarflokkurin**

## Umboðsmannaval

Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis lýsir til umboðsmannaval 15. mars 2000. Veljast skulu tvey umboð fyri Vestmanna og eitt umboð fyri Kollafjarðar sókn.

Uppskot til umboð skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2000.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**

Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður søkir

## Leiðara

at byrja 15. mai í ár.

Leiðarastarvið er eitt fulltíðarstarv. Umsøkjari má hava góð samstarvsevni og duga at verða andlitið hjá stovninum úteftir. Dentur verður lagdur á, at leiðarin er røkin og førur fyri at taka avgerðir, hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum, og dugir at geva bæði børnum og starvsfólkum íblástur.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur og er normeraður til 60 børn í aldrinum 3 til 7 ár. Á stovninum arbeiða 20 fólk íroknað húsavørð og reingerðarfólk. Flestu av hesum arbeiða niðursetta tíð.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal verða stovninum í hendi áðrenn 1. mars.

Nærri fæst at vita við at venda sær til leiðaran á tlf. 312253.

**Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður**
J. Paturssonar gøta 13 • 100 Tórshavn

Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður søkir

## Pedagog

til 1. august í ár.

Starvið er 30 tímar á eini stovu við 20 børnum í 3 til 7 ára aldri. Tað sum dentur verður lagdur á er, at tú hevur umsorgan fyri barninum og dugir væl at samstarva.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal verða stovninum í hendi áðrenn 1. mars.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kanst tú ringja tlf. 312253.

**Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður**
J. Paturssonar gøta 13 • 100 Tórshavn

## Ársaðalfundur - 2000

Boðað verður til ársaðalfundar á Parnassinum á Hotel Hafnia hósdagin 24. feb. 2000, kl. 19.30.

Fundarskráin verður eftir felagsins lógum §18 við uppskotum um lógarbroytingar.

**Havnar Handverksmeistarafelag**

## GRØNLENDSK FRAMSÝNING

Grønlendski listamaðurin
*Thue Christiansen*
sýnir fram
skurðmyndir, standmyndir og gagnslist
í forhøllini

## Í LISTASKÁLANUM

Framsýningin letur upp
hósdagin 17. februar kl. 16.00

Thue Christiansen, ið umframt
at vera listamaður, eisini er skrivstovustjóri
í grønlendsku umsitingini
og limur í nevndini fyri Norðurlandahúsið
í Føroyum, verður sjálvur til staðar.

LISTASAVN FØROYA

Sosialurin - 311820

## Søkt verður eftir prentara

at byrja skjótast tilber.

Førleikakrøv: Kunnleika til flexo-prent.
Góð samstarvsevni.
Viðkomandi útbúgving.

Løn sambært nærri avtalu.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvi og viðmæli, verður at senda til okkum áðrenn 22.2.2000.

VEST PACK

**P/f Vest Pack**
Box 109 • FO-350 Vestmanna
Tlf 424107 • Fax 424509
E-mail: vestpack@post.olivant.fo

## Eysturoyar Javnaðarfelag

Aðalfundurin er útsettur til mikukvøldið 16. februar kl. 20 og verður í bygdasalinum í Ítróttarhøllini á Skála.

Við á fundinum verða Jóannes, Henrik, Vilhelm og Dan.

**Nevndin**

## Timburmenn søkjast

til arbeiði á Jútlandi. Skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt. Fá meiri at vita á

**tlf. 0045 20450198**

www.sosialurin.fo